vikublaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyrritaksstjóri: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen -Jóstinus Eidesgaard - Sjúrður Skaale - Eyðun Klakkstein

Útgevari, uppsetning og prent: P/F Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr.: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Lesarabrøv

Trongskygni av ringasta slag

Oddagrein

VIÐSKYGNI hevur ikki júst eyðkent Dimmalætting ella Sambandsflokkin. Men í gjár setti »Nýggja« Dimma met, tá hon viðgjørdi Norðurlandaráðið.

NORÐURLANDARÁÐIÐ fær av at vita. Tað er óneyðugt. Tað kostar bara pening. Og mappudreingirnir møta slettis ikki upp. Einasta úrslitið í huga dansktsinnaða leiðaraskribentsins er alt pappírið, sum Norðurlandaráðið spýtur út. Tað hevur heldur eingin tíð at lesa. Heldur ikki redaktørurin.

HÓAST redaktørurin ikki hevur tíð at lesa nakað av tí, sum norðurlendska samstarvið letur úr hondum, kundi hann, um ikki annað, latið hugin reika nakað. Kanska kom æraði redaktørurin at huga um onkra góða løtu í Norðurlandahúsinum?

NORÐURLANDAHÚSIÐ er bara eitt av hundraðtals – ella túsundtals – norðurlendskum verkætlanum og tiltøkum. Í norðurlendskum høpi er eitt ríkt mentalív, samskifti millum bólkar av alskyns slag, útgáva av nógvum ymiskum, næminga- og læraraskifti, útbúgvingartiltøk og ikki minst gransking.

ÁBYRGDINA av hesum hava Norðurlendska ráðharraráðið og Norðurlandaráðið. Tað er her, at játtanir verða latnar. Tað er her, at úrslit verða viðgjørd. Og tað er her, at norðurlendskir politikarar og onnur í norðurlendskum arbeiði hava høvi at hittast, læra av royndum og søta út í kortið av nýggjum.

OG tað er júst tað, Norðurlandaráðið hev-ur gjørt nú, men tað veit redaktørurin á Dimmu sjálvandi ikki. Upplýsing hevur ikki júst eyðkent skrivingarlag hansara. Arbeiðið hjá Norðurlandaráðnum – og her verður hugsað um dagliga arbeiðið – verður júst nú broytt og lagað eftir tíðarinnar tørvi. Norðurlandaráðið verður eisini meira viðskygt og fer at draga annað enn Norðurlond upp í arbeiðið.

NORÐURLANDARÁÐIÐ er bara ein karmur. Eins og løgtingið. Arbeiðið – avrikini – síggja vit í tí dagliga. M.a. tá tiltøk eru í Norðurlandahúsinum. Alt norðurlendska samstarvið kostar einar 700 milliónir krónur – men tað er lítið sammett við tað, sum kemur burturúr.

NEI, Norðurlond hava ein felags mentanararv. Vit skilja hvønn annan og vit kunnu arbeiða saman á so nógvum økjum, at aðrar tjóðir misunna norðurlendingum henda arv og sið. Hetta eiga vit fegin at gjalda fyri at varðveita og byggja út.

VIT skulu ansa eftir ikki at gerast nalva-skoðarar, sum leiðslan á »Nýggju« Dimmu. Alt vælsignilsi liggur ikki í landsuðuri. Vit mugu koma úr okkara dunnuhyli, um vit skulu menna okkum. Handa oddagreinin umboðaði trongskygni av ringasta slagi, sum bara elvir til afturstev og niðu.

Sosialurin

Til landsstýris- og løgtingslimir til umhugsunnar

Tá ið Bjarni Djurholm í kjaksending í SvF heitti á Edmund Joensen, løgmann, um at leggja frá sær, haldi eg, at hann gjørdi ov nógv av.

Tá ið vit líta aftur um bak – til 6. oktober 1992, tá var tað eingin, sum heitti á Atla Dam, løgmann, og Jógvan Sundstein, fíggjarmálaráðharra, um at leggja frá sær. Tað sama við Maritu Petersen, tá ið hon var niðri og samráddist, tí tað var »forleyparin« til ta stóðu, vit eru í í dag.

Tað vísir seg, at politikarar hava eina stóðu, tá ið teir eru í samgongu, og eina aðra, tá ið teir eru í andstøðu. T.d. tá ið Finnbogi Ísakson var fíggjarmálaráðharri, segði hann, at hann hevði 100% álit á dønum. Men nú hugsar hann kanska øðrvísi.

Tað var rætt í sínari tíð, tá ið eitt samt løgting kravdi eina dómarakanning av bankamálinum. Sambandsflokkurin er kendur fyri, at tá ið hann fyrst hevur tikið eina stóðu at halda seg til tað. Men hetta hevur Bjørn á Heygum brotið.

Tá ið hann sjálvur segði, at tað skuldi verða ein dómarakanning, broytti hann kortini stóðu og var ímóti eini dómarakanning. So hetta hjá Sambandsflokkinum um at halda upp á tað »bestående« er farið í søguna.

Um eg minnist rætt, so segði Marita Petersen í somu SvF-sending, at tey biðaðu bara eftir boðum frá dønum. Tá ið tað er soleiðis, so hava vit slett ikki brúk fyri nøkrum landsstýri.

Høvdu fakfelagsleiðarar í teimum stóru og landsfelagunum passað síni feløg í staðin fyri at renna sum hvølpar aftan á Atla Dam, hevði mangt verið øðrvísi.

Eg haldi eisini, at landsmyndugleikarnir áttu at havt betri eftirlit við kommununum, so at tann einstaki borgarin fær tryggjað síni rættindi.

Fólk skulu kunna venda sær til sína heimakommunu um øll almenn viðurskifti, so sleppast kann undan at ringja ymsastaðni, nú telefonin er so dýr.

So eg vil enn einaferð heita á myndugleikarnar um at fáa bæði bankamál og onnur mál undir eina dómarakanning.

Virðingarmest,

Viggo Holm, Skála

Opið bræv til Føroya biskup

Sunnudagin hevði undirritaði Foreldra- og barnagudstænastu kl. 15.00 í Kollafjarðar kirkju. Væl av fólki, serstakliga ungar familjur við børnum teirra vóru møtt upp. Umframt at nýta sálmabók okkara (sjálvsagt) sungu vit inn ímillum ymiskar lættar barnasangir undir leiðslu av Annfinni, har børnini, eins væl og forelrini, luttóku av heilum hjarta. Eisini var altargangur, har tey flestu, bæði børn og vaksin, luttóku (vit nýtt vín við ongum rúsevni í).

Uttanfyri gudstænastutíð hava vit prestar loyvi til at nýta aðrar tekstir enn teir, ið eru fyriskipaðir í tekstarøðum okkara; hetta nýtti eg eisini høvið til. Eg nýtti Orðatøkini 22,6: »Lær tú óvitan um vegin, hann skal halda, so man hann enn á gamalsaldri ikki víkja av honum«. Somuleiðis brot úr Ef. 6,1–3: »Tit børn, lýðið foreldrum tykkara…«

Eg skal ikki endurgeva alla prædikuna her, men um háttvirdi biskupur okkara ynskir hetta, fær hann hana. Sum skilst av tekstunum, eg hevði valt, deildi eg prædiku mína í tvey: nakrar fáar min. til foreldur og nakrar til børn.

Í fyrra partinum av prædikuni kom eg inn á uppaling: nevndi m.a. teir fyrilestrar, ið hava verið í ÚF, kom nakað inn á hvat tað er, ið lagt verður niður í barnasálina og sinn teirra ungu. Eisini kom eg stutt inn á kjakið, ið júst nú er aktuelt um samkynt. Eg nevndi, at eg ikki dømdi tey, men kom tað so langt, at vit sum prestar skuldu fara at veita signing ella víga samkynt, ætlaði eg mær at skriva bræv til hennara hátign, Margrethu Drotning og takka fyri meg, og so taka fylgjurnar og melda meg úr Fólkakirkjuni.

Hetta hevði onkur tikið sær ilt av; ringt meg upp og helt, at eg var farin út um lógarinnar mark.

Kæri Hans J. Joensen, bispur og starvsfelagi! Eg fari hervið at heita á teg um alment at svara hesum spurningi. Eg sigi, eins og Luther gjørdi á sinni: »Her standi eg, eg kann ikki annað«, eg handli eftir míni samvitsku sambært tí, heilagi Andin hevur sannført meg um.

Við tøkk fyri upptøkuna!

Kollafjørður, hin 13.11.1995
Gerhard Hansen, dr.teol.

Anfinn og Marita í samstarvsnevnd

Í sambandi við endurskoðanina av arbeiðnum í Norðurlandaráðnum, vórðu á fundi í september í ár í Keypmannahavn gjørdar broytingar í Helsingforsavtaluni.

Hesar broytingar hava við sær, at bygnaðurin í Norðurlandaráðnum verður broyttur.

Allar verandi nevndir verða avtiknar og í staðin skal norðurlendska samstarvið framyvir byggja á 3 súlur (3 høvuðsnevndir): Nevndin fyri norðurlendskt samstarv, Europanevndin og Nærumhvørvisnevndin.

Í nevndina fyri norðurlendskt samstarv, sum er mett at vera tann týdningarmesta, fáa føroyingar tvey umboð, Anfinn Kallsberg og Maritu Petersen. Formaður fyri nevndini verður norðmaðurin Kjell Magne Bondevik. Tað verða tveir næstformenn, har Anfinn Kallsberg verður annar teirra.

Nýggju nevndirnar taka við 1. januar 1996.

Amnesty International

Upplatingartíðirnar hjá Amnesty International, Føroya Deild eru: Týsdag, hósdag og fríggjadag frá kl. 13 til kl. 17. Tlf. 15816.

Temakvøld um toleransu

Í sambandi við, at ST-dagurin hevði 50 ár á baki 24. oktober, og at ST hevur útnevnt 1995 at vera toleransusár, hevði Bahá'í Samfelagið samkomu 24. oktober.

Vístar vórðu ljósmyndir úr ymsum londum, har var tónleikur úr Spaniu, Svørikis, Afrika og Russlandi, og á borðinum vóru køkur úr øllum heiminum.

- Nú mannaættin líður undir kriggi og intoleransu , er tað meira enn nakrantíð jívsjáttandi og fløvandi at síggja, hvussu nógv vit menniskju, tá saman um kemur, hava til felags.

- Latið kærleikan til medmenniskjuni byrja í hjarta okkara og latið okkum - fyri okkara felags Guds skyld - gevast vit at kríggjast.

- Latið okkum í virðing fyri hvørjum øðrum gera ein betri heim.

"Jørðin er bara eitt land, sum mannaættir býr í". Bahá'u'lláh.

Hesa heilsan sendir lokala andaliga ráðið hjá Bahá'í í Havn út.

Stál er kalt og hart -
Børn
eru bleyt
og sart !
Bilbelti er livbelti !
rff
HELPO

PIZZA-VINIR
Hetta tú hug at fáa eina, ella fleiri PIZZA inn á gólvið, so ring tlf. 18866, og tú hevur PIZZA-ina innan eina tíma.
Vit í PIZZARIA royna altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, so leiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyring.
Vit hopa at hetta tilboð kemur væl við.
PIZZARIA
Tlf. 18866

BINGOTØLINI í dag
25 71